# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Listaframsýning á Hotel Runavík



Fanny Karbech Mouritsen av Saltnesi hevur málningaframsýning á Hotel Runavík í Mentanarvikuni í Runavík 22. – 29. oktober.

Fanny er úr Havn, dóttir Marin, f. Jacobsen, og Gunnar Karbech Mouritsen, Gunnar í Snikkarastovu, málarameistara í Havn.

Fanny flutti til Danmarkar fyri tíggju árum síðan, men býr nú aftur í Føroyum. Tað eru sjey ár síðan hon byrjaði at mála, og hevur hon fyrr havt framsýningar í Sindal og Hirtshals. Fanny sigur at møguliga liggur tað til familjuna at mála, tí mamma hennara var systkinabarn til bæði William Heinesen og Bent Restorff, sum báðir vóru kendir listamenn. Pápi hennara dugdi eisini væl at mála málningar, men var ikki við á nakrari framsýning.

Framsýningin verður opin hvønn dag í Mentanarvikuni frá kl. 10 - 18.




## Ongantíð ógreiður – ofta bersøgin

Í morgin verður Sofus Olsen gravsungin úr Sandskirkju og jarðaður eitt hanagleiv, haðani hann var føddur og vaks upp, og har Listasavnið á Sandi stendur. Ættin og umhvørvið har vóru honum so kær.

Sofus fór væl um kappaaldur og hevði eitt fjølbroytt lív. Sjálvur skrivar hann soleiðis um ein lut, - sum kemur á Listasavnið á Sandi, tá seinni helmingur av listaverkum hansara verða flutt av Tinghúsvegnum, heimi hansara og Gunnhildar - um árini sum sluppfiskimaður:

Ílat úr fitisteini at eta úr. Eg fann tað í útdeyðari bygd í Vesturgrønlandi. Var til skips við sluppini Maritana í 1934. Eg havi goymt lutin, tí hann minnir meg um tey seks hungursárini eg var sluppfiskimaður, trælaárini undir ómenniskjansligur korum, eitt sera vandamikið starv umborð á hálvthundrað ára gomlum dangum, illa ella næstan ikki viðlíkahildin.

Tey árini eg var á Suðurlandinum, gingu fýra sluppir burtur, við mann og mús. Tá ein fór avstað um várarnar, var tað við tí fyri eyga, at ein møguliga kom ikki aftur, men fekk váta grøv í íslendskum sjógvi. Avrokningin kom fyri alt árið stutt fyri jól og var sera lítil, einar 300 kr ella minni í meðal.

Ætlan hansara var at halda fram sum sluppfiskimaður eins og pápin, men hesum forðaði Símun á Skarði, tá hann ein vetur var á háskúlanum. Sofus var ikki so at yvirtala, men Símun skrivaði til Høng um henda evnaríka unglingin, og tá vakurt bræv kom aftur úr Høng við boð um pláss á skúlanum hevði Símun av Skarði nakað at arbeiða við.

Sofus tók studentsprógv á Høng í 1940 og slapp ikki heimaftur vegna heimsbardagan og fór tí til Keypmannahavanar at lesa búskaparfrøði.

Hugdjarvur sum hann var, vardi ikki leingi til hann var aktivur í



donsku mótstøðurørsluni og mátti undir jørðina. Øllum hesum sigur hann frá í sjónvarpsupptøku um list sína, ið eisini gerst ein áhugaverd frágreiðing um litríka lív hansara. Tað nemur við okkum og man fara at nema við ungfólk okkara, tá Sofus sigur frá munnligari próvtøku á Universitetinum, har hann lutvís skal hyggja at professaranum og lutvís at hurðini, samstundis sum hann situr og hugsar um, hvussu hann skal megna at taka til beins, um týskararnir koma at heinta hann.

Sofus hevði góðan ordan í mongu skjølum sínum, og vónandi kemur brævaskiftið hjá Símuni av Skarði við rektaran á Høng eins og skjal ella skjøl um hansara luttøku í donsku mótstøðurørsluni saman við nógvum øðrum tilfari, sum frálíður at liggja frammi ella vera atkomuligt á Listasavninum á Sandi.

Sum kunnugt skrivaði hann nógvar greinar um m.a. list og listafólk í Dimmalætting. Tá hetta lá so væl fyri hjá honum, loyvdi eg mær at biðja hann skriva nakað um egnu listaverk síni. Tað hevði verið so forkunnugt, tá listasavnið lat upp við øllum listaverkunum, at tað vóru søgur til myndirnar. Eg var ovurfegin, tá hann kom við einari síðu fyri og aðrari eftir m.a. um fitisteinin úr Vesturgrønlandi, skrivaðar – ikki á teldu, men skrivimaskinu. Sjálvur kallaði hann tað bara terapi hjá einum gomlum manni. Men hetta var alt so áhugavert, at eg helt hyggjuráðini vera ein sjónvvarpsfilm til Listasavnið á Sandi, so tey, ið vitja har, sjálvi kunnu síggja hann siga frá.

Sofus hevði í langa lívi sínum samskifti við nógv fólk, og var kendur fyri at vera bersøgin. Hetta lyndi eyðkendi hann, og jakslarnir vóru tøkk og prís vælvirkandi til tað seinasta. Ongatíð ivaðist tú í, hvørjum hann var samhaldsfastur við. Vit vóru samsint í politikki, og hann royndist mær mangan hollur, tá eg sum tingkona hevði tørv á með-og mótspæli.

Har var onki himpr. Skemtingarsamur eisini. Stuttligt var at hoyra hann siga frá, hvussu hann sum skrivari hjá Havnar arbeiðsmannafelagi legði eitt verkfall til rættis í 50-árunum.

Eingin dugur betur enn Sofus sjálvur at siga frá hendingaríka lívi sínum, og hvussu hann gjørdist hugtikin av myndlist. Frásøgn hansara er ikki bert áhugaverd við brotum úr egnum lívi, hon er eisini partur av okkara listasøgu og samtíðarsøgu. Sofus var lítillátin. Honum dámdi ikki at vera í fokus, eitt nú tá hann í januar í ár var valdur til ársins føroying og í samband við, at listasavnið á Sandi lat upp í summar hin 17. juni í ár við helminginum av listaverkum hansara. Tí verður steðgað her, eisini fyri at fólk kunnu gleða seg til sjónvarpsfilmurin kemur.

Friður fylgi minninum um heimasandsmannin Sofus Olsen.

**Karin Kjølbro**

## Føroyskt framleidd sending í norðurlendskum sjónvørpum

**Sendingin um myndahøggaran Hans Paula Olsen verður at síggja í øllum norðurlondum**

MENTAN

Føroyskt framleitt sjónvarpstilfar er ikki ofta at síggja í norðurlendskum sjónvørpum. Men nú hava almennu sjónvarpsrásirnar í øllum Norðurlondum boðað frá, at tær vilja vísa sendingina "Myndir úr málmi" um myndahøggaran Hans Paula Olsen. Sendingin varð gjørd í vár og fyrstu ferð send í Kringvarpi Føroya á páskum.

Nú skal sendingin umsetast til danskt, og síðani verður hon latin sjónvarpsrásunum í hvørjum landi sær til versionering, sum tað eitur, tvs. til umseting, teksting og lestur, so hon fær somu heild á viðkomandi máli, sum hon hevur á føroyskum. Aðrar broytingar verða ikki gjørdar, og sendingin er tann sama, sum hevur verið víst í føroyskum sjónvarpi.

Tað er sjónvarpsmaðurin Bogi Godtfred, sum hevur gjørt sendingina í samstarvi við Jógvan Eli Dam, ið er fotografur í Kringvarpinum. Tveir danskir og ein føroyskur fotografur, Johannes Danielsen, gjørdu eisini upptøkur til sendingina.

**Viðurkenning**

– Tað er gleðiligt, at hini norðurlondini fara at vísa sendingina, og í hesum liggur ein viðurkenning av føroyskum sjónvarpsarbeiði. Tað hevur týdning at aðrar og nógv størri sjónvarpsrásir meta okkara arbeiði at vera dygdargott, sigur Bogi Godtfred.

Sendingin er eitt frálíkt høvi at vísa norðurlendsku grannum okkara ein av Føroya mætastu listamonnum, Hans Paula Olsen. Myndir hansara eru hugtakandi, bæði tí at tær eru sterkar listaligar, og tí at handalagið er so framúrskarandi. Tað eru skotsmálini, Hans Pauli og verk hansara fáa frá listaummælarum.

At savna allar træðrir til eina sjónvarpssending uppá trý korter kann vera drúgt, men Hans Pauli er viðeiriligur og lættur at samstarva við, og tað hjálpir væl, tá framleiðslutíðin er avmarkað, sigur Bogi Godtfred.

Londini, ið samsvara í Nordvision eru Ísland, Noreg, Svøríki, Danmark og Finnland umframt Føroyar. Í Nordvision verður samstarvað á fleiri økjum. Londini kunnu í felag lyfta kostnarmiklum framleiðslum, vera saman um framleiðslu av sendingum, sum verða vístar í øllum Norðurlondum umframt hetta at vera torg fyri sendingum hvør frá øðrum.



*Hans Pauli Olsen, myndahøggari*